# Útbúgvingarprofilur

**Ískoytisútbúgving í føroyskum kirkjukunnleika**

*Additional Certificate in Faroese Church Studies*

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Yrkisrættað ískoytisútbúgving í føroyskum kirkjukunnleika.<br>3 skeið, hvørt teirra svarandi í vavi til 10 ECTS, tikin yvir eitt tvey ára skeið. |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og Samfelagsdeildin. |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Mentamálaráðið. |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Útbúgvingin byrjaði á vári 2015 og verður boðin út, tá ið nýggir prestar koma í fast embæti í Fólkakirkjuni í Føroyum. |
| STIG | Master, sambært: EHEA-QF:"2nd Cycle" og sambært EQF-LLL: stig 7<br>Ískoytisútbúgving á masterstøði fyri prestar í fólkakirkjuni. |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Ískoytisútbúgvingin skal geva sóknarprestum tilvitsku og kunnleika um føroyska kirkjusøgu, skipan, siðir og embætisførslu, sum galda í Fólkakirkjuni í Føroyum. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | • Kirkjusøga<br>• Liturgik og hymnologi<br>• Kirkjurættur |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Serligur dentur verður lagdur á føroyskt tilfar |
| 3 | KÓS | Yrkisrættað útbúgving til gudfrøðingar við embætisprógvi úr útlondum |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Útbúgvingin rættir seg móti føroyskum viðurskiftum: føroyskari lóggávu og føroyskari søgu. Er eitt krav fyri at koma í embæti í føroysku fólkakirkjuni.<br><br>Útbúgvingin verður boðin út eftir tørvi.<br><br>Øll masterlesandi kunnu taka skeiðini, ið eru í útbúgvingini. |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Ískoytisútbúgvingin er krav fyri fólk sum taka við nýggjum embæti í fólkakirkjuni. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU OG UNDIRVÍSING | Fyrilestur og framløga, bólkaarbeiði og verkstova. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Prógv verður latið fyri skjalprógvaða luttøku í undirvísingini. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Hugsa kritiskt:** megna at hugsa og arbeiða kritiskt og sjálvkritiskt<br>**Yrki og arbeiðsøki:** hava førleika til at kenna og fata sítt arbeiðsøki og yrki<br>**Vitan í praksis:** duga at nýta sína vitan í praksis<br>**Miðla:** megna at miðla sína servitan til onnur |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Kirkjan í ymiskum samanhangum:** hava førleika til kritiska tilvitan um kirkjuna og hennara søguliga, samfelagsliga og mentanarliga samanhang og týdning<br>**Regluverk og fólkakirkjan:** hava holla vitan um bygnað og regluverk fólkakirkjunnar<br>**Lesa tekstir kritiskt:** duga at lesa átrúnaðarligar tekstir neyvt og kritiskt við atliti at upprunamerking, tulking og nýtslu í søgu og nútíð |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving duga tey lesandi at:<br>• eyðmerkja og skilja ímillum tey stóru kristnu trúarrákini og meta um tað árin, tey hava havt á føroyskt trúarlív<br>• greina ymisk tekstasløg og nýta tey sum kirkjusøguligt keldutilfar<br>• lýsa føroyska gudstrúgv við dømum úr frásagnum og átrúnaðarligum skaldskapi<br>• kjakast um stríð og samstarv millum kirkjuligar myndugleikar og embæti øðrumegin og tað virkna leikfólkið hinumegin<br>• greiða frá muninum millum prædiku og lestur<br>• greiða frá føroyskum gudstænastuhaldi, søguligum fortreytum og tilfeingi<br>• vísa neyvt innlit í kirkjunnar heilagu bøkur, løggildar bøkur eins væl og nýggjar royndir<br>• greina sálmar við atliti at høvundi og samtíð og við útliti til teirra leiklut í gudstænastligum høpi<br>• lýsa nútíðar liturgisk rák og taka støðu til tey<br>• nýta sína vitan um liturgi og sálmar at skipa fyri gudstænastum<br>• lýsa tað fólkakirkjuliga lógarverkið við sínum søguligu og politisku fortreytum<br>• greina ta kirkjuligu lóggávuna við atliti til embætisførslu, starvi og umsiting |

| | |
|---|---|
| | Having completed the course the students will be able to:<br>• define and distinguish between major Christian currents and evaluate their impact on Faroese church life<br>• read various literary forms and use them as sources of church history<br>• use narratives and religious poetry as examples of Christian faith<br>• discuss disputes and collaboration between church authorities, clergy and lay people<br>• distinguish between authentic sermons and lay readers' use of printed homilies<br>• describe Faroese liturgy, its history and present resources<br>• demonstrate a proficient insight into the sacred books, authorised version as well as experimental publications<br>• analyse hymns with regard to their author, original context, and use in contemporary worship<br>• define and evaluate present liturgical trends<br>• apply their liturgical and hymnological skills when composing their services<br>• describe the church laws and their historical and political conditions<br>• analyse church regulations in relation to official duties and administration |